# Moby & The Void Pacific Choir
# – Are you Lost in The World like Me

Sosialir miðlar hava sera stóran týdning fyri samleikamenningina hjá teimum ungu. Her hava tey møguleika at vísa, hvussu tey vilja verða sædd av umheiminum, og eisini fáa íblástur frá øðrum. Men sosialir miðlar kunnu eisini skapa trupulleikar. Í sosialum miðlum kann lívið hjá øðrum skjótt síggja út til at vera stuttligari og betri enn eins egna, og tað kann vera strævið. Samstundis skapa sosialir miðlar rúm fyri nethapping, og tíðin til nærveru og sambond í veruliga lívinum gerst minni.

Í tónleikaupptøkuni hjá Moby **“Are You Lost in The World Like Me”** lýsir hann hesar trupulleikarnar. Tónleikaupptøkan hevur ein greiðan hugburð og boðskap um brúk okkara av sosialum miðlum og avleiðingarnar, brúk/misbrúk kann hava.

## Hvat læri eg?

- Eg læri at kjakast um týdningin, sosialir miðlar hava fyri gerandisdagin og trivnaðin hjá ungum
- Eg læri at greina boðskap í eini tónleikaupptøku og brúka teir í kjaki um samleika og felagsskap

## Aktivitetur:

- Videoupptøka: https://www.youtube.com/watch?v=VASywEuqFd8&feature=youtu.be

- **Arbeiðsháttur: kjakringur**

1. Tveir eins stórir bólkar
2. Helvtin stendur í hálvringi. Øll skulu venda bakið inn ímóti miðjuni á ringinum
3. Hin helvtin stillar seg frammanfyri teim, ið standa í ringi
4. Lærarin setur fram ein spurning ella eitt evni og sigur, hvussu langa tíð tit hava at kjakast, td. tveir minuttir.
5. Tú kjakast við tann, ið stendur frammanfyri tær, til tíðin er farin
6. Tá ið tíðin er farin, flytir tú teg eitt pláss við urinum og kjakast um sama spurning við tann, ið nú stendur yvir av tær, inntil tíðin er farin